AMNESTY

*Bræv, dagfest 6 mai 2008, fingið 28. juli, frá stjórnarskrivstovu í Mexico, sum svar til bræv hiðani, dagfest 4. mars 2008, um Adriana Sarmiento Enríquez, ein av ungu gentunum og konunum, ið eru dripnar ella horvnar í býnum Ciudad Juárez í landspartinum Chihuahua.*

Samandráttur:

Tey hava ikki funnið gentuna, og brævið er ein frágreiðing um arbeiðið hjá nevndini, sum er sett at "fyribyrgja og beina fyri harðskapi móti kvinnum í Cuidad Juárez". Henda nevndin er ein samskipan av 8-9 ymiskum stovnum og myndugleikum, nevnd í brævinum og umboðandi ríkið, landspartin og kommununa.

Ein almenn hvítbók er skrivað um trupulleikarnar í síni heild, og greitt verður frá kanningunum og tiltøkum og um leitingina eftir Adrianu um allan býin í samstarvi við familju og fólki, sum kenna hana.

Í brævinum siga tey seg harmast um gongdina, men vissa samstundis um, at myndugleikarnir gera alt, sum til ber at fylgja alheims reglum at verja mannarættindi, og í hesum føri serliga rættindini hjá kvinnum.

At enda verður greitt frá trimum høvuðspørtum í arbeiðinum. Fyrsti parturin er at stuðla og verja kvinnur, sum eru fyri harðskapi og hjálpa familjum teirra, annar partur er at styrkja sosialu trygdina, og triði nevnist Sannleiki og Rættvísi og er um tiltøkini, ið beinanvegin verða sett í verk, at finna tær horvnu kvinnurnar og seta tey til svars, sum standa aftan fyri illgerðirnar.

Aðalstjórin, Nohemí Almada Mireles, fegnast um áhugan um allan heim at verja mannarættindini og vísir til telefon og bústað, har tað ber til at venda sær við nærri fyrispurningum í málinum.